UTTAN ÚR HEIMI

# Stríðið snýr seg ikki bara um tekningar og átrúnað



*Mótmælismaður vísir sigurstekinið uttan fyri ta brennandi donsku sendistovuna í Beirut*

Mynd: Reuters

**Tekningarnar av Muhammed profeti eru bara ein partur av frágreiðingini um tað, sum hendir í hesum døgum, og Danmark gjørdist offur fyri innanhýsis ósemjum í muslimska heiminum og jarnbrot hjá teimum, sum vilja hava eina uppgerð við Vesturheimin**

Tað eru ikki bara tær tólv tekningarnar hjá Jyllandspostinum, sum fáa uppøstar mannamúgvur at brenna danska flaggið í gøtunum í Miðeystri og aðrastaðni og at seta eld á danskar sendistovur í Damaskus og Beirut. Tekningarnar vóru bara svávulpinnurin, sum bleiv brúktur til at festa í við.

Tað sigur Jørgen Bæk Simonsen, lektari á Carsten Niebuhr-stovninum á lærda háskúlanum í Keypmannahavn.

– Tey, sum standa fyri ófriðinum í Libanon, eru kanska tey, sum vóru misnøgd við ta loysnina, sum bleiv vald, tá borgarakríggið har endaði. Tí kann talan vera um kristnar kreftir ella tann muslimska høgravongin, sigur hann við danska sjónvarpið.

Miðeysturserfrøðingurin Helle Lykke Nielsen er samd við Jørgen Bæk Simonsen.

– Tey, sum halda, at hetta bara snýr seg um átrúnaðarlig viðurskifti, mistaka seg fullkomiliga, sigur hon. Helle Lykke Nielsen heldur, at í summum londum brúka stjórnirnar og víðgongdar kreftir Muhammedstekningarnar til egið gagn. Hon samanber støðuna við ein fótbóltsvøll við nógvum leikarum, men ongum bólti.

– Tekningarnir eru bólturin, og tá hann kom inn á vøllin, fóru fleiri aftan á honum fyri at vita, hvussu tey kundu fáa sum mest burtur úr honum, sigur Helle Lykke Nielsen við danska sjónvarpið.

Hon vísir eisini á, at støðan hevur leingi verið spent í fleiri av teimum arabisku londunum við stríði ímillum stjórnirnar og víðgongdar kreftir og innanhýsis ósemjum ímillum teir víðgongdu felagsskapirnar. Við Muhammedstekningunum hava partarnir funnið eitt, sum teir kunnu semjast um, men hendan semjan verður ikki drúgv.

– Tey fingu eitt felags mál á einum silvurfati, og nú kunnu tey standa lið um lið og finnast at einum pinkulítlum landi. Men hendan gleðin verður stokkut, tí málið umfatar nú eisini onnur lond so sum Frakland, og fleiri av hesum londunum hava ongan áhuga í at keglast við Evropa, tí tað kann geva teimum álvarssamar trupulleikar, sigur Helle Lykke Nielsen.

### Ikki bara Danmark

Tær mest víðgongdu islamistisku kreftirnar eru til reiðar at brúka hvørt høvi til at virka fyri einari uppgerð ímillum tann muslimska heimin og Vesturheimin, og vesturlendskir diplomatar eru á einum máli um, at tekningarnar av Muhammed profeti komu sum ein gáva úr erva hjá hesum kreftum. Tað legði danski uttanríkisráðharrin eisini dent á á tíðindifundi sunnudagin:

– Tað snýr seg ikki bara um Danmark. Hetta er vorðið ein kreppa, sum er eitt álop á samstarvið ímillum tann arabiska heimin og Vesturheimin. Hetta er vorðið ein kreppa, har tey, sum ikki vilja vita av nýskipanum, demokratii og samstarvi ímillum mentanir, eru farin út á gøturnar at gera um seg, segði Per Stig Møller.

Í fleiri londum hava leiðandi politikarar eisini gjørt vart við, at málið snýr seg ikki bara um eina ósemju ímillum tey arabisku londini og Danmark, men allan Vesturheimin. Talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum segði í gjár, at USA stendur undir lið Danmarkar og Evropu í hesum máli, og NATO-aðalskrivarin, Jaap de Hoop Scheffer, segði, at eisini har fær Danmark fullan stuðul.

Vesturlendskir diplomatar siga sambært Berlingske Tidende, at stjórnirnar í londum sum Sýrialandi, Egyptalandi og Saudiarabia spæla eitt vandamikið spæl, eydnast tað teimum ikki at doyva vreiðina um tekningarnar. Kanska hevur trýstið vestan eftir longu havt sína ávirkan. Í hvussu er hevur libanski innanríkisráðharrin lagt frá sær.

## Fiskimenn snýta illa

Fiskiveiðieftirlitið í Danmark hevur varhugan av, at danskir fiskimenn fiska nógv meiri tosk, enn teir hava loyvi til, og at teir brúka allar snildir fyri at snýta eftirlitið.

Varastjórin í Fiskiveiðieftirlitinum, Claus Wille, sigur við Politiken, at fiskimenninir fylgja gjølla við, hvar menn hjá eftirlitinum eru, og at siga hvør øðrum frá. Tann nýggja skipanin við fylgisveinaeftirliti virkar heldur ikki, til skipini sløkkja tólini, so eftirlitið ikki kann síggja, hvar tey eru stødd. Claus Wille sigur, at tað er næstan einki mark fyri, hvat fiskimenninir kunnu finna uppá, og tí er orsøk til at rópa varskó nú, sigur hann.

Tøl hjá ICES vísa, at í 2004 fiskaðu danir næstan 20.000 tons meiri av toski í Eystrasalti, enn teir høvdu loyvi til, og at tann ólógligi fiskurin bleiv seldur fyri slakar 200 milliónir krónur.

Formaðurin í danska fiskimannafelagnum, Flemming Kristensen, ásannar, at danir veiða meiri tosk, enn teir hava loyvi til. Men hann heldur, at tað er ES fyri at takka, tí kvoturnar hjá teimum donsku skipunum eru alt ov smáar, sigur hann.

## Prestur myrdur

Tann 60 ára gamli katólski presturin Andrea Santano varð skotin uttan fyri eina kirkju í turkiska býnum Trabzon sunnudagin. Presturin, sum var ættaður úr Italia, varð skotin, beint eftir at hann hevði havt messu í kirkjuni, siga turkisku myndugleikarnir.

Eygnavitni hava greitt løgregluni frá, at tað var ein ungur maður, sum skeyt prestin, og við hjálp av einari tekning av manninum leitar løgreglan nú eftir honum.

Turkisku myndugleikarnir hava fordømt morðið, men teir vilja ikki siga, um tað kann hava samband við stríðið um Muhammedstekningarnar hjá Jyllandspostinum. Tekningarnar hava eisini elvt til vreiði í Turkalandi. Stjórnin hevur fordømt tær, og sunnudagin gingu fleiri hundrað fólk mótmælisgongu í Istanbul. Mannsterk løgreglulið forðaðu tó fyri ófriði.

## Vandamiklir fangar flýddu

Altjóða løgreglusamstarvið, Interpol, stendur tilbúgvið, eftir at 23 fangar eru flýddir úr einum fongsli í Jemen.

BBC veit at siga, at Interpol metir fangarnar vera eina hóttan ímóti øllum londum. 13 teirra verða sagdir at hava tilknýti til yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda, og at teirra millum er maðurin, sum skipaði fyri álopinum á amerikanska herskipið ”USS Cole” í 2000. Ein annar skal hava havt samband við atsóknina at franska tangaskipinum ”Limburg” í Persaflógvanum í 2002.

Sambært BBC eydnaðist tað teimum 23 monnunum at flýggja ígjøgnum ein 140 metrar langan tunnil, sum teir høvdu grivið úr fongslinum til eina mosku. Har eydnaðist tað teimum at fjala seg ímillum fleiri hundrað fólk, sum júst høvdu verið í moskuni til bønarhald.

## Kvinnur sum biskupar

Anglikanska kirkjan er nú til reiðar at skifta orð um at loyva kvinnum at virka sum biskupar. Í síðsta mánað fekk kirkjan eina frágreiðing, og har var niðurstøðan, at kvinnur eiga at sleppa at virka sum biskupar.

Í 1992 varð samtykt, at kvinnur skuldu sleppa at virka sum prestar í anglikonsku kirkjuni, og tvey ár seinni vórðu tær fyrstu settar í starv. Síðani eru nógvar komnar afturat, og í dag er sætti hvør prestur kvinna.

Nú skal so støða takast til, um kvinnur eisini skulu sleppa at vera biskupar. Tær konservativu kreftirnar innan kirkjugátt halda, at tann ovasti andaligi leiðarin hjá kirkjuni eigur at vera ein maður, sjálvt um sjálvur kirkjuleiðarin, Elisabeth drotning, er kvinna. Ovasti andaligi leiðarin er erkabiskupurin í Canterbury.